

## Fremad Amager tapti

Tað gekk illa hjá Fremad Amager í donsku 1. deild um vikuskiftið. Liðið hevði vitjan av botnliðnum Braband, sum vann dystin heili 3-0. Longu eftir tríggjar minuttir fekk ein spælari hjá Fremad Amager reytt kort, og Braband skoraði upp á frísparkið. Í seinna hálvleiki skoraði Brabrand tvey mál afturat. Andrew av Fløtum, Tem Hansen og Jónas Tór Næs spældu allir 90 minuttir fyri Fremad Amager.

## Slagelse javnt í fyrru finaluni

Danska felagið Slagelse fekk javnleik við sær heimaftur úr Russlandi, tá ið felagið um vikuskiftið spældi fyrru finaluna í Champions League í kvinnuhondbólti. Mótstøðuliðið í finaluni er Lada Togliatti, og nú kann Slagelse avgera alt á heimavølli. Dysturin um vikuskiftið endaði við javnleiki 29-29. Tað var líkavið, at Slagelse vann dystin, tí russiska liðið javnaði stutt fyri leiklok.

# Nýggjur skrivari í ÍSF

**Stríðsval var um skrivarastarvið í ÍSF, tá ítróttarsambandið helt aðalfund í gjárkvøldið. Verandi skrivari, John Kjær, fall. Nýggjur skrivari er Katrin Joensen, sum vann atkvøðugreiðsluna 40-22.**

ÍTRÓTTUR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Í formansfrágreiðingini til aðalfunddin leygarkvøldið vísti ÍSF-forsetin millum annað á týdningin av, at ítrótturin hevur góðar fíggjarligar karmar at virka í.

- Nú stórur dentur verður lagdur á fólkaheilsu, er alneyðugt, at ítrótturin við sínum stóra heilsuliga týdningi hevur góðar og tryggar fíggjarligar karmar at virka í. Tað kundi verið ynskiligt við eini hægri játtan á fíggjarlógini, nú útlit eru fyri, at stuðulin frá Ítróttavedding fer at minka, tí minni verður spælt, segði Heðin Mortensen, forseti í ÍSF.

Meðan hann fegnaðist um skipanina við fríferðum til ítróttafólk og ávísar batar í skattaviðurskiftunum hjá ítróttaleiðarum, verða hesir batar tó í stóran mun skerdir av torskildum reglum.

Ítrótturin hevði seinasta ár avbjóðingar bæði á fjølmiðlaøkinum, har ósemja var um tulkingina av avtaluni við Kringvarpið, og í samband við Ítróttadómstólin og reglurnar fyri hesum virksemi.

Dopingeftirlitið hjá Ítróttasambandi Føroya helt fram við sínum virksemi, og tær 12 royndirnar, ið vóru tiknar í 2006 vóru allar negativar. Ítróttasamband Føroya tók lut í tveimum visjónsbólkum hjá Landsstýrinum, og er eisini við í eini verkætlan við eini ítróttabreyt á einum miðnámsskúla, skrivar ÍSF í tíðindaskrivi.

Víðari stendur, at eisini á altjóða pallinum hevur Ítróttasamband Føroya verið virkið seinasta árið. Umframt árliga norðurlendska ítróttafundin varð eisini luttikið í aðalfundum hjá Evropeisku Olympisku Nevndini, Altjóða Oyggjaleikanevndini og European Non Governmental Sports Organisation. Hetta er ein evropeiskur felagsskapur fyri ítróttasambond og olympiskar nevndir.

Í heyst fer Føroyar at vera vertur fyri árliguráðstevnuni hjá hesum felagsskapinum.

Arbeitt verður við ætlanum um at fyriskipa Oyggjaleikir í Føroyum aftur í framtíðini.

Nevndarval var eisini á skránni. Varaforsetin, Petur Elias Petersen, varð afturvaldur uttan mótvalevni.

Til skrivarastarvið var stríðsval. Atkvøðast skuldi millum skrivaran seinastu tvey árini, John Kjær, og fyrrverandi forkvinnuna í Svimjisambandinum, Katrin Joensen. Tá avtornaði vann Katrin Joensen atkvøðugreiðsluna 40-22. Hon tekur tí við sum skrivari í starvsnevndini hjá Ítróttasambandi Føroya.



*Talan var um seinasta aðalfundin hjá John Kjær, sum mátti lata skrivarasessin til Katrin Joensen*

# B68 og FSV04 økja um leiðsluna

**ÍF misti í toppstríðnum, og mest óvæntaða úrslitið hesa ferð var í Leirvík, har SÍ fekk fulla úrtøku**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

B68 og FSV04 stýra ímóti Formula deildini, og tað gongur við rúkandi ferð. Leygardagin fingu bæði feløgini trý stig afturat inn á kontina, og tað munaði eyka nógv, tá ið næstu kappingarneytarnir ikki fingu fult.

ÍF misti tvey stig á stokkinum, tá ið fuglfirðingar vitjaðu á Sevmýri. Eftir hálvan tíma legði Elvan Taser ÍF á odda. Eftir innlegg úr vinstru smekkaði útlendski fuglfirðingurin upp í nettakið.

Síðstu løtuna royndi TB at trýsta. Óli Johannesen var í álopinum, og hann átti uppleggið til málið, sum Olivur Abrahamsen skoraði, tá ið vanliga leiktíðin var farin.

LÍF hevði vitjan av SÍ, og sørvingar fóru vestur aftur við øllum stigunum. Støðutalvan segði, at LÍF var favorittur, og miðskeiðis í 1. hálvleiki legði Andreas Lava Olsen LÍF framum. Leirvíkingar høvdu aðrar møguleikar í 1. hálvleiki. Eitt nú sendu teir eina ferð í stólpan aftanfyri Sunvard Joensen.

Stutt eftir steðgin javnaði Jens Erik Rasmussen við brotssparki, sum varð dømt, tá ið Jørgen Meitilberg varð feldur í brotsteiginum. Tveir minuttir seinni var Jens Erik Rasmussen aftur upp á spæl, eftir at Jørgen hevði spælt hann leysan. Jørgen Meitilbert staðfesti trivaliga og óvæntaða SÍ útisigurin.

B68 vitjaði HB, og toftamenn vóru omaná størsta partin av tíðini. Øssur Hansen átti innleggið úr vinstru, sum Kristian Anton Andreasen umsetti til 1-0. Fyrstu løtuna eftir steðgin spruttaði HB, sum spældi seg fram til onkran møguleika.

Toftamenn settu nakrar ungar spælarar inn á vøllin at spæla síðstu løtuna, og tá øktu teir til bæði 2-0 og 3-0. Í báðum førum var talan um fín langskot. Tað fyrra syrgdi Jann Ingi Petersen fyri, og í seinna førinum var tað innskifti Henning Joensen, sum var málskjútti.

FSV04 hevði vitjan av teimum næstbestu í NSÍ. Heimafavorittarnir vórðu kløkkaðir, tá ið NSÍ beinanvegin legði seg á odda. Tað tóktist sum um, at teir á heimaliðnum steðgaðu upp fyri rangstøðu, og Sonni L. Petersen smekkaði úr vinstru og í málið.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki javnaði Elfinn Ørvarodd eftir fríspælt frá Andrzej, og tríggjar minuttir eftir fyrsta FSV04 málið skoraði Sjúrður Ellefsen til 2-1. Jovan Panic átti fríspælingina, og Sjúrður Ellefsen var málskjútti. Jovan Panic átti næstsíðsta fótin á, tá ið Elfinn Ørvarodd økti til 3-1, og toppskjúttin Andrzej staðfesti 4-1 sigurin, tá ið hann eftir innlegg úr høgru snaraði kring seg sjálvan og skoraði.

Botnuppgerðin í Gundadali millum B36 og KÍ endaði 2-2. Talan var um góða manning á báðum liðnum. Heimaliðið var leikliga oman á, men Kristian Andreasen javnaði fyri KÍ til 2-2 í síðstu løtu. Sami miðvallari hevði lagt KÍ framum 1-0. B36 málini skoraðu ungu menninir Sigurd Carlsen og Kristian í Garði.

## FAKTA UM 1. DEILD

***9. umfar***
**LÍF-SÍ 1-3 (1-0)**
1-0: Andreas Lava Olsen 20.
1-1: Jens Erik Rasmussen br 53.
1-2: Jens Erik Rasmussen 55.
1-3: Jørgen Meitilberg 77.

**TB-ÍF 1-1 (0-1)**
0-1: Elvan Taser 31.
1-1: Olivur Abrahamsen 90.

**HB-B68 0-3 (0-1)**
0-1: Kristian Anton Andreasen
0-2: Jan Ingi Petersen
0-3: Henning Joensen

**FSV04-NSÍ 4-1 (2-1)**
0-1: Sonni L. Petersen 6.
1-1: Elfinn Ørvarodd 23.
2-1: Sjúrður Ellefsen 26.
3-1: Elfinn Ørvarodd 60.
4-1: Andrzej Stretowicz 64.
Reytt kort: Jovan Panic

**B36-KÍ 2-2 (1-1)**
0-1: Kristian Andreasen 11.
1-1: Sigurd Carlsen 28.
2-1: Kristian í Garði 63.
2-2: Kristian Andreasen 90.

***10. umfar 19. mai:***
**B68-LÍF**
B36-FSV04
KÍ-HB
NSÍ-TB
SÍ-ÍF